

www.oljan.fo

**Jan Müller** 09 - 04 - 2013

# Føroyingar við í stórum oljufundi í Norra

Ikki bert sviar og norðmenn kunnu fegnast um, at oljufelagið Lundin hevur gjørt eitt stórt oljufund á norska landgrunninum. Eisini føroyingar, sum hava týðandi størv hjá felagnum, kunnu í hesum døgum fegnast um, at teirra felag hevur gjørt enn eitt stórt fund. Talan er um oljuleiðina Luno 2, sum liggur nærhendis oljukeldunum Johan Sverdrup og Edvard Grieg, oljukeldur, sum Lundin eisini eigur stóran lut í. Roknað verður við, at nýggja keldan goymir einar 200 milliónir tunnur av olju. Enn er Lundin varið við at koma við tølum, men fer at kunna um nøgdirnar í kelduni um einar tvær vikur sigur forstjórin í felagnum Ashley Heppenstall í tíðindaskrivi. Hetta er eitt av teimum stóru oljufundunum á norska landgrunninum seinastu 10 árini, sigur greinarin Trond Omdal í Arctic Securities við E24 portalin. Teknisk Ukeblad skriver, at oliefundið kann vera størri enn Goliat-keldan, sum oljufelagið ENI hevur funnið í Barentshavinum. Tað er mett at goyma 174 milliónir tunnur av olju og verður nú útbygt. Lundin er eitt av teimum smærri oljufeløgunum, sum hevur havt eydnuna við sær, serstakliga eftir at tað saman við Statoil fann risastóru oljukelduna Johan Sverdrup í Norðsjónum. Hetta fundið var eitt sætt gjøgnumbrot í norskari oljuleiting, tí myndugleikar og oljufeløg høvdu ikki roknað við, at møguligt var at finna sokallaðar elefantar longur í Norðsjónum. Tann oljukeldan er mett at vera ein tann størsta, sum nakrantíð er gjørd á norskum øki og fer at verða útbygd. Nú kemur so Luno 2 oljukeldan í kjalarvørrinum á Johan Sverdrup fundinum og fer hetta fer at gera Lundin til eitt av teimum mest hepnu og dugnaligu oljufeløgunum á norska landgrunninum. Tað er eisini áhugavert at bíta merki í, at tveir føroyingar sita í týðandi størvum í Lundin. Í Geneve situr havnarmaðurin Teitur Poulsen og stýrir stóra partinum av tí fíggjarliga økinum, sum hevur við keyp og sølu at gera. Og í Oslo situr klaksvíkingurin, Tummas Pauli í Mýri, sum stendur á odda

fyri einum bólki av búskaparfrøðingum. Oljan.fo hevði samrøðu við Tummas Paula herfyri og er hon at finna á oljan.fo.